

*Gazellutiltakið, sum Business-line saman við Børsen fyriskipaði í Eik Banka í fjør, fekk nógva umtalu í stóra danska vinnublaðnum BØRSEN. Á myndini handar blaðstjórin á Børsen, Leif Bech Fallesen eina gazellustandmynd til Jóan P. Vang, gazelluvinnara í 2007. Við lið blaðstjórans stendur Bjarni Olsen, stjóri í Eik banka við heiðursskjali til vinnaran.*

*Mynd: Rógvi Sivertsen*

# Byggivinnan eigur flestu gazellufyritøkurnar

## Nógva virksemið í byggivinnuni hesi seinastu árini hevur lagt støðið undir einum nýggjum vinnuligum fyribrigdi í Føroyum: Gazellur ella vakstrarfyritøkur

GAZELLUR
*Finnur Sivertsen, búskaparfr.*
*Business-line*
*www.bl.fo*

Føroyski búskapurin hevur havt gott rák tey seinastu árini og góðir fíggingarmøguleikar hava gjørt tað møguligt hjá mongum at seta føtur undir egið borð.

Bæði vinnan og tað almenna byggja eisini í góðum tíðum, hóast allar búskaparligar lærubøkur mæla tí almenna til afturhald í íløgum, tá virksemið í landinum er stórt. Hetta, fyri at tálma eftirspurningin, tvs. prísvøkstri og fyri minka um sveiggini í byggivinnuni.

Góðar tíðir í byggivinnuni skapa stóran eftirspurning eftir føroyskum handverkarum, og tá eftirspurningurin er størri enn útboðið av handverkarum, tá hækkar jú prísurin.

Góðir inntøkumøguleikar hava tí verið í byggivinnuni hesi seinnu árini og hetta sæst eisini aftur, tá hugt verið eftir, hvørjar føroyskar fyritøkur hava havt størstan vøkstur, tey seinastu 4 árini.

### Vinnarafyritøkurnar

Í oktober mánaða í fjør fyriskipaðið Business-line saman við danska vinnublaðnum Børsen eina gazelluráðstevun í Eik Banka í Havn, har 3 tær skjótast vaksandi fyritøkur í Føroyum vóru funnar og heiðraðar.

Høvuðskrøvini til eina gazellufyritøku eru tey, at bruttovinningurin, BV, skal vera meira enn tvifaldaður seinastu 4 árini, samstundis sum felagið ikki má hava havt hall nakað av hesum árum.

Vinnarafyritøkan 2007 gjørdist Sp/f Jóan Petur Vang, Oyri. Felagið er ein byggifyritøka, ið hevur sítt mesta virksemið í Sundalagnum.

Nr. 2 gjørdist Sp/f El.fo ið veitir tænastur innan elinlegging, mest í høvuðsstaðarøkinum.

Nr. 3 gjørdist Sp/f Selmar Nielsen, arkitektur, ið rekur arkitektavirki í Tórshavn.

Sostatt átti byggivinnan allar gazelluvinnararnar í 2007.

### 26 gazellur í 2007

Í 2007 vóru tilsamans vóru 26 føroyskar fyritøkur, ið kundu krýna seg við heitinum "gazella". Av hesum 26 eru 9, ella meira enn triðja hvør fyritøka, ið hevur sítt mesta virksemið innan byggivinnuna:

### Vøkstur í BV

Gazellufyritøkur í byggivinnuni 2003-2006

| | |
|---|---|
| 1. Sp/f Jóan Petur Vang, Oyri | 438% |
| 2. Sp/f El.fo, Argir | 393% |
| 3. Sp/f SN. Arkitektur, Tórshavn | 283% |
| 4. Sp/f Eikin, Tórshavn | 253% |
| 5. P/f 360°, Tórshavn | 203% |
| 6. Sp/f TN Bygging, Saltangará | 198% |
| 7. Sp/f Inventartænastan, Tórshavn | 178% |
| 8. Sp/f Húsavarðatænastan, Tórshavn | 160% |
| 9. Sp/f MAP arkitektar, Tórshavn | 120% |

### Barometrið fellur

Sum øllum kunnugt er ferðin á føroyska búskapinum minkað nakað hetta seinasta árið og hetta ávirkar eisini byggivinnuna.

Áhugavert verður tí at kanna, um vinnugreinin "bygging" megnar at halda tørn og aftur gerast gazelluvinnari í 2008. Tað fara vita at frætta nærri um til heystar.